Meginfelag Áhugaleikara Føroya
Undir Pisuvarða 2 * FO-100 Tórshavn * Tel. 285624 * E-mail: maf@maf.fo * www.maf.fo

# Sminkuskeið 3. – 5. februar 2023



Dámar tær væl at spæla við sminku og skapa andlitið ella kroppin um til nakað heilt annað? So tekna teg til spennandi sminkuskeiðið hjá MáF **í Løkshøll 3. – 5. februar 2023**.

Á skeiðnum lærir tú at arbeiða við eini røð av ymiskum innan sminku so sum voks, feittsminku, alkohol-sminku, stívilsi, latex gummi og silikoni, umframt at tú lærir kynstrið at sminka við pensli, svampi og luftpensli. Hvussu gert tú t.d. eitt veruleikakent arr, eitt blátt merki, eitt sár og eitt brunasár frá tí minsta løstinum til tann mest ógvusligan skaðan?

Alt hetta lærir tú á skeiðnum við danska undirvísaranum Anders Lerche, ið er sjálvlærdur make-up artistur og leikgripavørður. Anders hevur arbeitt innan films- og sjónleikavinnuna í meir enn 28 ár og somuleiðis undirvíst í leiksminku næstan líka leingi. Hann hevur arbeitt á fleiri av stóru donsku leikhúsunum og hevur eisini gjørt latex maskur til amerikanska Halloween ídnaðin. Inni á Facebook sæst nakað av tí, Anders hevur gjørt: ***Anders Lerche | Facebook***

Undirvíst verður fríggjakvøld frá kl. 19:00 og leygardag og sunnudag frá uml. kl. 09.00-18.00 báðar dagarnar. Íroknað skeiðið er undirvísing. Luttakararnir taka matpakka og drekka við sjálvi umframt egna sminku og greiðir.

Lærari: **Anders Lerche**

**Málbólkur**: Byrjarar og vandir make-up artistar.

Prísurin fyri skeiðið er **kr. 1.500,-** fyri hvønn luttakara. Avmarkað pláss.

Áhugaði kunnu fáa meiri kunning og tekna seg elektroniskt inni á heimasíðuni hjá MáF www.maf.fo ella við at fara inn á tiltakið ***Sminkuskeið 2023*** á Facebook. Skráseting er fyrst galdandi, tá ið goldið er á konto í **Eik Banka: 9181-185 132 4 í seinasta lagi 15. januar 2023**.